# STUÐUL TIL
## UMHVØRVISGÓÐKENNINGAR

Eitt mál í nýggju Heim-strategiini hjá Visit Faroe Islands er, at 50% av ferðavinnufyritøkunum hava eina umhvørvisgóðkenning. At fáa slíka góðkenning er ofta lættari enn fólk halda. Kortini kann tað vera møtimikið at fara undir, tá talan er um eina lítla fyritøku, sum ikki hevur arbeitt skipað við burðardygd áður. Nú ber til at fáa stuðul til at fáa eina slíka umhvørvisgóðkenning til vega. Dømi um triðjaparts góðkenningar, sum stuðul kann veitast til, eru: Green Key, Svanen, ISO, B-Corp, Travel Life, osfr.

### PRIVATAR FYRITØKUR

Privata ferðavinnufyritøkur hava møguleika fyri at søkja Vinnuframa um stuðul til ráðgeving í sambandi við umhvørvisgóðkenning.

Tað er ein fyrimunur, um fyritøkan er nýhugsandi, fíggjarliga burðardygg og hevur vakstrarmøguleikar. Hetta verður mett í hvørjum einstøkum føri.

### STUÐULSUPPHÆDD

Vinnuframi kann veita stuðul upp til 100% av verkætlanarkostnaðinum.

### UMSÓKN

Umsóknarblað fæst á heimasíðuni hjá Vinnframi.

Vinnuframi hevur umleið átta umsóknarumfør um árið. Sí dagfestingar fyri innlating og viðgerð av umsóknum á heimasíðuni: www.vinnuframi.fo

### KUNNINGARSTOVUR

Kunningarstovur og/ella kommunur kunnu søkja um stuðul frá Visit Faroe Islands til ráðgeving í sambandi við eina grøna góðkenning.

Helmingurin av upphæddini kann latast í stuðuli.

### ALMENT RIKIN SØVN OG FERÐAVINNUSTØÐ

Í Føroyum skulu ferðavinnustøð eisini umhvørvisgóðkennast, hetta kunnu vera støð í náttúruni eins og søvn.

Hetta kann Visit Faroe Islands eisini veita stuðul til við helminginum av stuðulsupphæddini

### KOMMUNAL KAMPINGSTØÐ

Kommunal kampingstøð kunnu eisini fáa stuðul til ráðgeving í sambandi við eina umhvørvisgóðkenning og helmingurin av stuðulsupphæddini kann endurrindast frá Visit Faroe Islands.

### UMSÓKN

Send skrivliga umsókn til info@visitfaroeislands.com og viðmerk umsóknina 'Stuðul til umhvørvisgóðkenning'

vinnuframi

Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands